# Ferðavinnuætlan fyri Kalsoynna




Gunn H. Møller

08-06-2022

Ferðavinnuætlan fyri Kalsoynna

Tórshavn 08.06.2022/ghm

Vestara bryggja 15.3
100 Tórshavn
Tlf. +298 259700
gunn@gunn.fo
www.gunn.fo

## Innihaldsyvirlit

Kanningin og niðurstøður ........ 3
Lýsing av verandi støðu ........ 5
Kalsoy ........ 5
Veganeti í Kalsoy ........ 5
Ferðasamband ........ 6
Leið 56 Klaksvík – Syðradalur/ Syðradalur - Klaksvík ........ 7
Leið 506 Trøllanes – Syðradalur / Syðradalur - Trøllanes ........ 10
Ynski um økt túratalið á ferðasambandinum millum Klaksvík og Syðradali ........ 12
Samrøður í sambandi við kanningin ........ 15
Møguleikan at fara við bussi til Kalsoyar sum ferðafólk ........ 16
Tilmæli og uppskot til broytingar ........ 18
Ferja- og busssamband ........ 18
Prísur ........ 19
Nøktandi kapasitetur á bussinum ........ 20
Bíleggingarskipan – Møguleika at planleggja ferðina út á Kallin heimanífrá ........ 21
Kunning ........ 22
Onnur tiltøk á Kalsoy, sum kunnu betra um avbjóðingarnar við verandi støðu ........ 23
Súkkling í Kalsoy ........ 23
Ferðafólkahús ........ 25
Tiltøk í sambandi við, at ferðafólk hava bil við í Kalsoy. ........ 26
Kunning um, hvussu koyrast skal á 1 breytaðum vegum og tunlum ........ 26
Tørvur á fleiri summarhúsum ella B&B ........ 27
Bilkø fyri oyggjabúgvar ........ 27
Trøllanes ........ 28
Mikladalur ........ 32

## Kanningin og niðurstøður

Gerast skal ein kanning í samband við tí veksandi ferðafólkaferðsluni í Kalsoy. Kanningin fevnir um eina lýsing av verandi skipan, og hvussu tørvurin er hjá ymisku málbólkunum, umframt eitt boð uppá, hvussu ferðslan kann skipast betri framyvir.

Ætlanin er at seta í verk eina royndarskipan á sumri 2022, sum skal eftirmetast, áðrenn endalig støða verður tikin til, hvussu ferðafólkaflutningurin eigur at skipast framyvir.

Kanningin skal lýsa átøk, sum kunnu fremjast til tess at skipa ferðavinnuna í oynni betri, við serligum atliti til bila- og bussferðslu, parkering, skelting og annað. Talan er um átøk, ið við minst møguligum inntrivi í náttúru og bygdarlív røkka endamálinum um eina smidliga ferðafólkaferðslu, ið er íbúgvunum í oynni til so lítlan ampa sum gjørligt.

Kanningararbeiðið fevnir um:

- Fyrireiking, kanna og fáa tilvega tilfar, greinan av hagtølum og líknandi
- Samrøður við borgarar í Kalsoy,
- Samrøður við teir, sum koyra bussar í Kalsoy, og SSL bygdaleiðir og kommunalu bygdaleiðina
- Samrøður við manning og onnur umboðandi SAM, SSL
- Samrøður við aktørar innan ferðavinnan, Visit Norðoy, Visit Kalsoy og Visit Faroe Islands, og møguliga aðrir aktørar sum til dømis HK bussar og Green gate Incoming
- Samskifti við myndugleikar (Klaksvíkar kommuna, Landsverk, løgregla o.a.)
- Skráseting og kanning av umstøðunum á staðnum.
- Uppskot til loysnir (skitsur og frágreiðing )
- Skriva frágreiðing og gera framløgu

Komið er til fylgjandi niðurstøður:

Yvirskipað verður mett, at fyri at nøkta tørvin hjá ferðavinnuni og íbúgvunum í Kalsoy eigur ferðasambandi (ferja og buss) at betrast munandi við øktum túratalið og eini bíleggingarskipan. Tað eigur at kannast nærri, um útreiðslur í tí sambandi hjá SSL kunnu fíggjast heilt ella partvís víð at ferðafólk gjalda ein annan prís enn tey, sum búgva í / ferðast nógv til Kalsoy.

Mett verður eisini, at ein bíleggingarskipan í sær sjálvum uttan økt túratal á kalsoyarleiðini á ein avgerandi hátt hevði loyst nógvar av avbjóðingunum hjá teimum, sum ferðast til og frá Kalsoy.

Men um ynski er, um økt ferðavinnuvirksemi við fleiri ferðafólkum, er ikki nóg mikið við bara eini bílegingarskipan. Um so er, er neyðugt eisini at økja um túratalið á kalsoyarleiðini.

Mett verður eisini, at verandi støða kann betrast við ymiskum øðrum tiltøkum á oynni. Fokus eigur at vera á tiltøk, sum stuðla, at ferðafólk fáa møguleikan at koma til Kalsoy uttan bil. Hugsað verður



Gunn Ráðgeving, Vestara Bryggja 15, 100 Tórshavn, telefon 259700, gunn@gunn.fo, www.gunn.fo

serliga um betri busssamband og møguleikarnir at ferðast í oynni á súkklu. Harumframt eiga stig at verða tikin til at betra um kunning, skelting og parkeringsviðurskifti í bygdunum.

Niðanfyri eru tilmælini. Mett verður, at betri ferðasamband (ferja og buss) við øktum túratalið og eini bíleggingarskipan eigur at raðfestast, men annars er tað torført at raðfesta tilmælini, tí tey flestu eru javnsett:

1. Betri busssamband í Kalsoy. Størri busskapacitet og fleiri túrar ímillum Trøllanes og Mikladal
2. Betri ferðasamband millum Klaksvík og Syðradal. Fleiri túrar, týsdag og hósdag og í vikuskiftinum
3. Bíleggingarskipan á netinum - Møguleika at planleggja ferðina út á Kallin heimanífrá
4. Príspakkar Tórshavn-Trøllanes, Klaksvík-Trøllanes
5. Betri busssamband ímillum Tórshavn-Klaksvík/aftur, so ikki er neyðugt at fara við bili
6. Betri kunning um ferðasambandi, undir hesum eisini kunningarskermar í Syðradali og í Klaksvík, har til ber at fáa kunning um ferðing til/frá Kalsoy, bæði við bili og uttan bil, og har møguleiki er at keypa ein samlaðan ferðaseðil
7. Ferðafólkahús á ferjuleguni í Syðradali
8. Súkkling í Kalsoy - Møguleiki at leiga súkklur og el-súkklur á ferjuleguni í Syðradali ella á ferjuleguni í Klaksvík.
    a. Fáa tilvega kunningartilfar um súkkling í tunlunum, har kunnað verður um, hvussu tunlarnir eru at súkkla í.
    b. Kassar við endurskinum verða settir upp við tunnilsmunnarnar
    c. Súkkluknap/Súkkluvarnarar sum ávarar bilførararnar um, at súkklur eru í tunlinum.
9. Parkeringspláss í Trøllanesi
10. Kunning um, hvussu koyrast skal á 1 breytaðum vegum og tunlum. Filmar og kunningarblað verða endurskoðað.
11. Kunningarskelti við íbindingina oman til Mikladal
12. Ferðsluskelti í Mikladali og í Trøllanesi


Gunn Ráðgeving, Vestara Bryggja 15, 100 Tórshavn, telefon 259700, gunn@gunn.fo, www.gunn.fo

# Lýsing av verandi støðu

## Kalsoy

Kalsoy er tann vestasta av teimum seks Norðuroyggjum og er ein long og smøl oyggj. Til víddar er hon 31 ferkilometrar.

Allar bygdirnar á Kalsoy eru í Klaksvíkar kommunu, og íalt búgva 80 fólk í Kalsoy. Bygdirnar, ið allar liggja á eystursíðuni á oynni, eru:
Syðradalur 6 fólk, Húsar 35 fólk, Mikladalur 24 folk og Trøllanes 15 fólk.

Bygdin Blankskáli liggur á vestursíðuni á oynni, men eftir ógvusligt skalvalop í 1809 flutti alt fólkið haðani og búsettist í Syðradali í staðin.

Kalsoyggin er ein smøl norð- suðurgangandi fjallarøð og ikki javnt høg. Norðantil, serliga vestursíðan, er høgt berg, men longur suðuri lækkar bergið og verður til brattar líðir og skorar. Undirhagin er lítil á verstursíðuni. Eystursíðan er meira grøn og ikki so brøtt. Á oynni eru í alt 11 dalar. Oyggin verður meira høglig, longur suður ein kemur. Nestindar (788 m.) eru hægsta fjall á Kalsoynni. Næsthægsta fjallið er Botnstindur, sum er 743 m. høgt.

Navnið hevur Kalsoy eftir Kallinum, sum var drangur norðast á oynni.

Kópakonuna í Mikladali er best kenda søgnin úr Kalsoynni.

Á Kalsoynni er nógv djóralív. Norðantil er nógvur bjargafuglur. Haran er einasta villini súgdjórið á oynni, og hvørki mýs ella rottur finnast í oynni.

Plantulívið er áhugavert, og fleiri sjáldsamar plantur finnast her. Kalsoyggin er einasta oyggin Føroyum, har tað er staðfest, at øll fýra sløgini av føroyskum píli vaksa .

Kalsoy er eitt landbúnaðarøki, har eisini tey flestu ársverkini eru. Nøkur ársverk eru á Smoltstøðini í Knúksdali millum Syðradal og Húsar.

Umframt at fiskimenn, eru eisini fleiri, sum pendla hvønn dag, bæði til Klaksvík og Tórshavn, og tey hava brúk fyri regluligum ferðasambandi.

Tað er veksandi áhugi í at fáast við ferðavinnu í Kalsoy. Nevnast kann, at Matsøla er á Húsum, Kaffistovan Edge í Mikladali, og Kiosk og Smiðja á Trøllanesi umframt túrar út á Kallin við ferðaleiðara.

Smáir skúlabygningar eru í øllum bygdum. Kirkja er á Húsum og Mikladali. FIFA leikvøllur er á Húsum og í Mikladali. Kampingpláss er í Mikladali. Ein viti er sunnan fyri Syðradal og ein norðast á Kallinum. Gomul mylna og smiðja eru í Mikladali. Felagshús eru á Húsum og Mikladali.

### Veganeti í Kalsoy

Bygdirnar Syðradalur, Húsar, Mikladalur og Trøllanes eru knýttar saman við 18 kilometrum av landsvegi. Íroknað hetta eru 4 tunlar, ið tilsamans eru góðar 5 kilometrar til longdar.

Byrjað var at gera vegakervið ímillum bygdirnar í 80'árunum. Í 2004 var ferjulegan á Syðradali liðug, og ferjulegan verður ídag nýtt av Strandfaraskipum Landsins í sambandi við farleiðina til og úr Klaksvík.

Ferðslan í oynni er lítil, men væl størri um summarið, tá nógv ferðafólk ferðast til Kalsoy. Serliga eru tað bygdirnar Trøllanes og Mikladal, sum hava størstan áhuga hjá ferðafólkunum.

Vegabreiddin á landsvegnum er ímillum 4-5 m. Vegabreiddin og longdin í tunlinum sæst í fylgjandi:

| | Longd | Vegabreidd | Fríhædd |
|---|---|---|---|
| Villingardalstunnilin, 1979 | 1193m | 3m | 3,7m |
| Ritudalstunnilin, 1980 | 683m | 3m | 3,8m |
| Mikladalstunnilin, 1980 | 1082m | 3m | 3,7m |
| Trøllanestunnilin, 1985 | 248m | 3m | 3,5m |

Fríhæddin í tunlunum er ímillum 3,5m og 3,8. Hesar hæddir kunnu hava avbjóðingar fyri ferðafólkabussar.

## Ferðasamband

SSL røkir ferðasambandið millum Klaksvík og Kalsoy, umframt bussleiðina á Kalsoynni. Hetta verður gjørt í tráð við Løgtingslóg nr. 82 frá 15. mai 2001 um fólka- og farmaflutning, sum seinast varð broytt við løgtingslóg nr. 55 frá 7. mai 2019 § 2:

*Flutningsskylda*

§ **2.** Landið hevur skyldu til at skipa fyri:
1) nøktandi sjóvegis fólkaflutningi, farmaflutningi og/ella flutningi av akførum, og
2) nøktandi landvegis fólkaflutningi, á teimum farleiðum, har tað heyur stóran samfelagsligan týdning, at skipað verður fyri slíkum flutningi.

*Stk. 2.* [1] [2] [3] [4] Flutningsskyldan fevnir um sjóvegis farleiðirnar millum: Tvøroyri - Tórshavn, Skúvoy - Sand, Skopun - Gamlarætt, Skopun -Hest, Hest - Gamlarætt, Nólsoy - Tórshavn, Sørvág - Mykines, Klaksvík - Kalsoy, Hvannasund - Fugloy, Hvannasund - Svínoy, umframt tær sjóvegis og landvegis farleiðir, ið landsstýrismaðurin í kunngerð ásetir flutningsskyldu fyri.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann seta reglur um, at farmur skal lúka ávís krøv til støddd, vekt, innhald og innpakking.



Gunn Ráðgeving, Vestara Bryggja 15, 100 Tórshavn, telefon 259700, gunn@gunn.fo, www.gunn.fo

## Leið 56 Klaksvík – Syðradalur/ Syðradalur - Klaksvík

Sam, sum røkir ferðasambandið millum Klaksvík og Syðradal, varð bygdur í 1981. Sam tekur 12-13 bilar og 115 ferðandi.



Umframt at Sam røkir farleiðina til Kalsoyar, røkir Sam eisini farmaflutning og annan flutning til aðrar útoyggjar. Harafturat siglir hann eisini leigutúrar. Týsdag og hósdag verður ikki siglt kl. 10.00, soleiðis at tað er gjørligt at røkja hesa túrarnar.

Tá ið tað ikki viðrar týsdag og hósdag at fara farmatúrar, verða hesir sigldir ein annan dag, t.d. mikudag. Hetta merkir, at Sam verður tikin úr sigling og annað skip sett í ístaðin. Hetta kann verða Erla Kongsdóttir, sum tekur 97 ferðafólk, ella Tjørnunes, sum tekur 12 ferðafólk, sum KSS eigur. Hesi skip hava tó ikki møguleika at taka bilar við umborð.

Hetta kann tískil merkja, at um mikudagur verður nýttur til farmaflutning, ber ikki til at sleppa av oynni við bili, týsdag, mikudag og hósdag millum 8.30 til 16.30.



Sam siglir eftir einari vetrarferðaætlan og einari summarferðaætlan eftir fylgjandi leisti:

Vetrarferðaætlan

**56 KLAKSVÍK - SYÐRADALUR**

| Úr: | Mán. | Týs. | Mik. | Hós. | Frí. | Ley. | Sun. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Klaksvík | 06.40 | 06.40 | 06.40 | 06.40 | 06.40 | | |
| Syðradalur | 07.00 | 07.00 | 07.00 | 07.00 | 07.00 | | |
| Klaksvík | 08.00 | 08.00 | 08.00 | 08.00 | 08.00 | 08.00 | |
| Syðradalur | 08.20 | 08.20 | 08.20 | 08.20 | 08.20 | 08.20 | |
| Klaksvík | 10.00 | | 10.00 | | 10.00 | 10.00 | 10.00 |
| Syðradalur | 10.20 | | 10.20 | | 10.20 | 10.20 | 10.20 |
| Klaksvík | 15.30 | 15.30 | 15.30 | 15.30 | 15.30 | 14.00 | 14.00 |
| Syðradalur | 15.50 | 15.50 | 15.50 | 15.50 | 15.50 | 14.20 | 14.20 |
| Klaksvík | 17.15 | 17.15 | 17.15 | 17.15 | 17.15 | 17.15 | 17.15 |
| Syðradalur | 17.35 | 17.35 | 17.35 | 17.35 | 17.35 | 17.35 | 17.35 |
| Klaksvík | 18.30 | 18.30 | 18.30 | 18.30 | 18.30 | | |
| Syðradalur | 18.50 | 18.50 | 18.50 | 18.50 | 18.50 | | |
| Klaksvík | 22.15[T] | 22.15[T] | 22.15[T] | 22.15[T] | 22.15[T] | 22.15[T] | 22.15[T] |
| Syðradalur | 22.35[T] | 22.35[T] | 22.35[T] | 22.35[T] | 22.35[T] | 22.35[T] | 22.35[T] |

T) Tilkall skal avgreiðast á tlf. +298 293116 ella á tlf. +298 293106 áðrenn kl 19:00 sama dag.

Summarferðaætlan byrjar 1/5 til og við 31/8.

**56 KLAKSVÍK - SYÐRADALUR**

| Úr: | Mán. | Týs. | Mik. | Hós. | Frí. | Ley. | Sun. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Klaksvík | 06.40 | 06.40 | 06.40 | 06.40 | 06.40 | | |
| Syðradalur | 07.00 | 07.00 | 07.00 | 07.00 | 07.00 | | |
| Klaksvík | 08.00 | 08.00 | 08.00 | 08.00 | 08.00 | 08.00 | |
| Syðradalur | 08.20 | 08.20 | 08.20 | 08.20 | 08.20 | 08.20 | |
| Klaksvík | 10.00 | | 10.00 | | 10.00 | 10.00 | 10.00 |
| Syðradalur | 10.20 | | 10.20 | | 10.20 | 10.20 | 10.20 |
| Klaksvík | 14.50 | 14.50 | 14.50 | 14.50 | 14.50 | 14.00 | 14.00 |
| Syðradalur | 15.10 | 15.10 | 15.10 | 15.10 | 15.10 | 14.20 | 14.20 |
| Klaksvík | 16.10 | 16.10 | 16.10 | 16.10 | 16.10 | | |
| Syðradalur | 16.30 | 16.30 | 16.30 | 16.30 | 16.30 | | |
| Klaksvík | 17.15 | 17.15 | 17.15 | 17.15 | 17.15 | 17.15 | 17.15 |
| Syðradalur | 17.35 | 17.35 | 17.35 | 17.35 | 17.35 | 17.35 | 17.35 |
| Klaksvík | 18.30 | 18.30 | 18.30 | 18.30 | 18.30 | | |
| Syðradalur | 18.50 | 18.50 | 18.50 | 18.50 | 18.50 | | |
| Klaksvík | 22.15[T] | 22.15[T] | 22.15[T] | 22.15[T] | 22.15[T] | 22.15[T] | 22.15[T] |
| Syðradalur | 22.35[T] | 22.35[T] | 22.35[T] | 22.35[T] | 22.35[T] | 22.35[T] | 22.35[T] |

T) Tilkall skal avgreiðast á tlf. +298 293116 ella á tlf. +298 293106 áðrenn kl 19:00 sama dag.

Munurin á ferðaætlanunum er, at túrurin, sum í vetrarætlanini fer av Klaksvík kl. 15.30, er broyttur í summarferðaætlanini til kl. 14.50, umframt at ein túrur er lagdur inn afturat mánadag til fríggjadag kl. 16.10 av Klaksvík.

Tey seinastu árini hevur verið stórur áhugi ímillum ferðafólk, bæði føroyingar og útlendingar, at vitja Kalsoynna. Hetta sæst eisini aftur á ferðafólkatølunum.

Í Kalsoy verður tosað um "fyri" og "eftir" Kópakonuna, sum kom í 2014. Tí síðani Kópakonan kom, er ferðafólkatalið í oynni vaksið munandi.

Á talvuni niðanfyri síggjast hagtølini yvir akfør, sum eru flutt millum Klaksvík og Syðradal frá 2009-2021. Her sæst, at frá 2014-2016 er ein lítil vøkstur. Men í tíðarskeiðinum 2016-2019 veksur talið av akførum við 53%, frá 6.319 til 9.670.  Í 2020, tá ið Korona farsóttin herjaði, fall talið aftur, men í 2021 er talið av akførum aftur á leið tað sama sum í 2017.




Á talvuni á næstu síðu sæst talið av ferðafólki, sum ferðast í millum Klaksvík og Syðradal í tíðarskeiðinum 2009 - 2021. Á talvuni sæst, at í 2009 - 2014 vóru ongar stórvegis broytingar í talinum av ferðandi, men í tíðarskeiðinum 2014 - 2016 økist ferðafólkatalið við áleið 48%. Frá 2016

til 2018 stagnerar talið eitt sindur. Men í 2018 - 2019 veksur ferðafólkatalið aftur 20%, og er ferðafólkavøksturin í 2019 nærum tvífaldaður síðani 2014. Tá ið Korona rakar, fellur talið av ferðafólkum, men frá 2020 til 2021 sæst aftur ein vøkstur í ferðafólkatalinum á 18%.




Niðanfyri sæst býti av ferðandi til Kalsoy, frá januar til desember, í tíðarskeiðinum 2014-2019. Frá 2014 og til 2019 nærum tvífaldast talið av ferðafólkum á Kalsoyarleiðini um summarið.




Í 2016 er ein stórur vøkstur í juli, tá ið 200 ára dagur varð hildin í Syðradali, og 1200 fólk komu til tiltakið. Tað sama var galdandi, tá ið Kalsoyar- og Kópakonudagur var 1.august 2015, og 1500 vitjandi vóru.

Hyggja vit eftir julimánað, sæst ein vøkstur uppá 28% frá 2018 til 2019, tá yvir 12.000 ferðafólk sigldu til og frá Kalsoy. Í juli 2020, tá ið heimurin var læstur niður orsakað av Koronu, fall talið av

ferðandi við 50%. Men hóast Koronu, sæst, at tiltakið hjá Visit Faroe Islands 'ferðast í egnum landi' hevði við sær, at í 2021 var ein vøkstur í summar mánaðunum, sum byrjaði at líkjast 2018.

Spurningurin verður nú um seinasti James Bond filminum 'No Time to die' , har 007 doyr á Kallinum, fer at hava ávirkan á komandi ferðafólkatalið í Kalsoy.

## Leið 506 Trøllanes – Syðradalur / Syðradalur - Trøllanes

SSL/Bygdaleiðir hevur ein buss til 25 fólk í Kalsoy, sum røkir ferðafólkaferðsluna.

Í 2020 avgjørdi Klaksvíkar Kommuna at stuðla Strandfararskip Landsins (SSL) við 500 túsund krónum árliga, soleiðis at bussurin á Kalsoynni koyrdi til og frá hvørjum túri hjá SAM. Við hesari loysn sluppu íbúgvar undan at bíða í tímavís at sleppa yvirum við SAM, tí tey og ferðafólk fingu møguleika at seta bilin eftir og brúka bussin ístaðin.

Fyri bæði íbúgvar og ferðafólk í Kalsoy var manglandi busssamband til allar túrar ein avbjóðing, sum merkti, at trupult var at brúka bussin, og neyðugt var hjá Kalsoyingum at koyra ella verða koyrdir til og frá Syðradalshavn.

Fyri ferðafólkini var neyðugt at hava bilin við til Kalsoyar, um ynski var at síggja bæði Trøllanes, Mikladal, Húsar og Syðradal. Avbjóðingin hjá ferðafólkunum er, at eingin bussur hevur koyrt ímillum Trøllanes og Mikladal, sum eru støðini har flest ferðafólk vitja.

Hava ferðafólkini verið á Kallinum og ynskja at at síggja Kópakonuna, hevur verið neyðugt at bíða, til bussurin koyrir næsta túrin í samband við ferðaætlanina hjá Sam. Eru ferðafólkini komin av Klaksvík kl. 10.00 og eru á Trøllanesi kl. 11.00, koyrdi bussurin ikki av Trøllanesi aftur fyrrenn kl. 15.15.

Í juli 2021, tá ið SAM fór á beding í 6 vikur, sigldi Erla Kongsdóttir ístaðin. Hetta merkti, at eingir bilar høvdu møguleika at koma til Kalsoyar hetta tíðarskeiðið. Í hesum sambandi gjørdi SSL avtalu um, at bygdaleiðir, umframt at koyra til allar túrarnar hjá bátinum, eisini koyrdi ein eykatúr ímillum Trøllanes og Mikladal, soleiðis at ferðafólk kundu bæði fara ein túr út á Kallin og til Mikladals at síggja Kópakonuna, um farið var úr Klaksvík kl. 10.00. Eykatúrurin var koyrdur av Trøllanesi kl. 12.30.

Hetta var eitt væleydnað tiltak, men tíverri vísti tað seg, at tað bara vóru tey, sum gingu skjótt, sum náddu aftur av Kallinum til hendan túrin. Tey flestu brúka 2 tímar til túrin út á Kallin. Kanningar vísa, at um tað bert er 1 túrur, sum verður koyrdur ímillum Trøllanes og Mikladal, eigur fráferðin frá Trøllanesi at verða kl. 13.00 ella 13.15 ístaðin fyri kl. 12.30.

Meðan Erla Kongsdóttir røkti farleiðina til Kalsoy, var ein stórur bussur, sum tók 48 ferðafólk, settur á farleiðina, soleiðis at til bar at hava 48 fólk við, ístaðin fyri 25. Hetta var ein góð loysn, serliga fyri oyggjabúgvar, sum nú sluppu undan at skunda sær til bussin, tá ið Sam legði at í Syðradali, soleiðis at tey ikki stóðu eftir ferjuleguni, av tí at bussurin var fullsettur av ferðafólkum.

Hyggja vit eftir hagtølunum yvir ferðafólk, sum brúktu bygdaleiðir í Kalsoy, síggja vit, at frá 2018-2019 økist talið av ferðafólkum við meira enn 60%. Í 2020, tá Korona rakti Føroyar, fall talið, men

frá 2020 til 2021 vaks talið av ferðafólkum aftur við 61% eftir einum árið. Frá 2018-2021 vaks talið av ferðandi í bussinum við 100%, frá áleið 6000 ferðafólkum í 2018 til 12.000 ferðafólk í 2021.




Á talvuni niðanfyri sæst, hvussu nógv ferðafólk koyra við bygdaleiðum frá januar til desember í tíðarskeiðinum 2018-2021.




Á talvuni omanfyri sæst vøksturin í juli 2021 týðiliga. Ein partur av hesum vøkstri kemst av, at í hesum tíðarskeiði bar ikki til at hava bil við til Kalsoy, og nógv av ferðafólkunum valdu at brúka bussin í staðin. Tað var eisini í hesum tíðarskeiði, at ein størri bussur varð settur inn á farleiðina í Kalsoy.

Hyggja vit eftir gongdini í juli 2018 – 2021, sæst at frá 2018 til 2019 vaks ferðafólkatalið í bussinum frá 587 í 2018 til 1907 í 2019, tað við siga ein vøkstur á 224%. Frá juli 2018 til juli 2021 økist ferðafólkatali frá 587 til 3461, ein vøkstur á nærum 500%.



Gunn Ráðgeving, Vestara Bryggja 15, 100 Tórshavn, telefon 259700, gunn@gunn.fo, www.gunn.fo

Sam var í dok í november 2018 og í februar 2020. So hetta átti ikki at ávirkað hagtølini fyri leið 506.

Tað kunnu vera fleiri orsøkir til, at talið av ferðafólkum, sum brúka bussin, økist so nógv millum 2018 – 2019. 2019 var árið, har Føroyar hevði flest ferðafólk, og har flest leigubilar koyrdu á veganetinum í Føroyum. Hetta var eisini árið tá ið avgjørt var at bussur skuldi koyra til allar ruturnar hjá SAM.

Eingi hagtøl eru, sum vísa, hvussu nógvir bilar ikki sluppu við Sam frá Klaksvík til Syðradal. Í sama tíðarskeiði er eisini relativt stórur vøkstur í akførum á leið 56, og hugsast kann, at fleiri ikki hava fingið bilin við og valt at brúka bussin í staðin.

Vøksturin í  2019 og 2021 er kanska eitt tekin uppá, at fleiri ferðafólk ikki velja Kalsoy frá, um ikki ber til at hava bil við, men velja at brúka bussin ístaðin, um bussleiðin nøktar tørvin.

## Ynski um økt túratalið á ferðasambandinum millum Klaksvík og Syðradali

Ynskið um at fáa fleiri túrar á farleiðini millum Klaksvík og Syðradal er ikki nakað nýtt, men hevur eina longri søgu.

Visit Kalsoy hevur umboðandi kalsoyingar í fleiri umførum heitt á SSL  um at fáa fylgjandi broytingar í ferðaætlanina á kalsoyarleiðini:

1. At ferðaætlanin um veturin og summarið er eins
2. At túrar vóru sigldir kl. 10.00 av Klaksvík hvønn dag
3. At siglt verður av Klaksvík 14.00 og kl. 15.30 ístaðin fyri kl. 14.50 og kl.16.10.
4. At leygardag og sunnudag verður siglt av Klaksvík kl. 18.30

Ad1)
At Sam siglir líka allar dagar í árinum, vil gera tað lættari hjá øllum, bæði hjá teimum sum regluliga brúka Sam í samband við arbeiði, læknaørindi, innkeyp og annað, og hjá ferðafólkunum, sum ynskja at vitja Kalsoy. Ferðavinnan hevur tørv á reglusemið alt árið.

Ad2)
Kalsoyingar ynskja at hava møguleikan at sleppa av oynni hvønn dag kl. 10.00, soleiðis at møguleiki er at fara til lækna, tannlækna, innkeyp ella annað. Í dag er neyðugt at fara av Syðradali kl. 8.20, um okkurt ørindi skal gerast týsdag og hósdag, og ein sleppur ikki aftur til Kalsoyar fyrrenn kl.14.50. Tað vil siga, at neyðugt er at verða burtur næstan 6-7 tímar.

Fyri vinnulívið á oynni er tað trupult, tá ið ikki ber til at sleppa av og til oynna ein stóran part av týsdegi og hósdegi

Fyri ferðavinnuna í Kalsoy, fæst eitt betri ’flow’ á ferðafólkastreymin, um til ber at koma til Kalsoy allar dagar í vikuni kl. 10.00. Túrurin kl. 10.00, er tann, sum tey flestu ferðafólkini velja, og tað verður einklari, tá ið til ber at koma til Kalsoy allar dagarnir í vikuni kl. 10.00.

Ad3)



Gunn Ráðgeving, Vestara Bryggja 15, 100 Tórshavn, telefon 259700, gunn@gunn.fo, www.gunn.fo

Hetta hevði gjørt, at bæði ein túrur fyrrapart og seinnapart var, har møguleiki hevði verið at vitja Kallin og Kópakonuna. Hetta hevði eisini gjørt, at tíðarrúmið ímillum túrarnar var styttri.
Hendan broytingin hevði harumframt gjørt tað smidligari hjá teimum, sum brúka bygdaleiðir, av tí at tey høvdu sloppið undan at bíða yvir ein tíma í Klaksvík, áðrenn bussurin fer avstað til Tórshavn og aðrastaðni. Hetta hevði stytt bíðitíðina til millum 20-30 minuttir.

Ad4)
Leygardag og sunnudag er eingin sigling ímillum kl.17.15 og kl. 22.15, tað vil siga 5 tímar. Kalsoyingar og onnur ynskja, at ein túrur eisini er kl. 18.30 leygardag og sunnudag, sum allar hinar dagarnar.

## *Notat viðvíkjandi Kalsoyarleiðini 2016-2017*

Í 2016 heittu Kalsoyingar á Henrik Old, táverandi Landstýrismann í samferðslumálum, um at fáa sett í verk, at fleiri túrar blivu til Kalsoy, serliga týsdag og hósdag kl. 10.00 umframt sigling leygardag og sunnudag kl. 18.30 av Klaksvík. Eisini var ynski, at vetrarferðaætlanin og summarferðarætlanin var tann sama, eins og tað er á øðrum farleiðum hjá SSL, sí fylgjandi:

Til Hendrik Old, landsstýrismann í samferðslumálum.

Undirritaðu kallsoyingar heita hervið á landsstýrismannin um at gera hesar broytingar í ferðaætlanini fyri M/F SAM. Okkara ynski er, at galdandi vetrarferðaætlan verður at galda alt árið, tó við hesum broytingum:
Týsdag og hósdag verður siglt kl. 10.00 av Klaksvík og kl. 10.20 av Syðradali - eins og hinar gerandisdagarnar í vikuni.
Vit skjóta somuleiðis upp, at túrurin kl. 18.30 av Klaksvík og 18.50 av Syðradali eisini verður sigldur leygardag og sunnudag.

Grundgevingarnar fyri hesum ynskjum um broytingar eru, at vit halda okkum fáa munandi meira gagn av túrinum kl 10.00 fyrrapart gerandisdagar, enn 3 túrum upp í slag seinrapart á degi. Fyri SSL er talan um at spara ein túr burtur hvønn seinrapart gerandisdagar um summarið. Túrurin leygardag og sunnudag seinrapart kemur at hava við sær, at ferðafólk hava betri stundir at vitja á Kallsoynni. Hendan broyting vil tí koma ferðavinnuni og kallsoyingum til góða.

Tá ið vit ikki kenna møguligar fíggjarligar avleiðingar av broytingini, hava vit valt at stíla skrivið til tygara, við vón um at tygum saman við SSL vilja ganga okkara ynskjum á møti.

Í apríl 2016 varð ein arbeiðsbólkur settur, hvørs arbeiðssetningur var:

*Ferðaætlanarbroytingar í smb. við fyrispurning frá Kalsoyingum til SMR tann 16.04.2016*[1]

SSL hevði fylgjandi niðurstøðu til, at Sam skuldi sigla týsdag og hósdag kl. 10.00 av Klaksvík til Syðradal og kl. 10.20 av Syðradali:

> *'tað er sera gott fyri SSL at hava frírúmið inni frá kl. 10:00 hjá Sam, tí Sam verður mangan brúktur til farmatúrar til útoyggjar, sum eru lógarásettir, og somuleiðis, tá okkara skip eru á beding, verður Sam settur at gera farmatúrar, tí ongin onnur bilferja hjá SSL megnar hetta. Endaliga eru nógvir leigutúrar við Sam árliga og er hetta ein góð tænasta fyri vinnufyritøkur í FO og samstundis ein mátalig inntøkukelda fyri SSL'.*[2]

[1] Kalsoyarleiðin, ynski sent SMR 04.2016 og viðgjørt 2016/2017- Arbeiðsbólkurin fyri Kalsoyarleiina 2017, s 2
[2] Kalsoyarleiðin, ynski sent SMR 04.2016 og viðgjørt 2016/2017- Arbeiðsbólkurin fyri Kalsoyarleiina 2017, s. 13


Gunn Ráðgeving, Vestara Bryggja 15, 100 Tórshavn, telefon 259700, gunn@gunn.fo, www.gunn.fo

Viðmerkjast kann, at lógarásettu farmatúrar eru:

Dímunar og Mykines, áleið 6 túrar um summari.

SSL metir, at um Sam skal sigla týsdag og hósdag kl. 10.00 og leygardag og sunnudag kl 18.30, svarar hetta til 118 túrar um árið. SSL metir víðari

> *'at tað fer at bera illa til at fáa 118 nýggjar túrar inn í komandi ári (2017), tí SSL hevur ikki umbiðið játtan til meirsigling á Kalsoyarleiðini í komandi ári. Tí mugu vit royna at hyggja eftir, um okkurt kann lata seg gera uttan ov stóran meirkostnað. Og eisini, at ynski við 118 fleiri túrum verður lagt fram fyri fíggjarárið 2018'.*[3]

Arbeiðsbólkurin kemur við fylgjandi tilmælum[4]:

- *Mælt verður til, at bíleggingarskipan verður sett í verk á Kalsoyarleiðini skjótast gjørligt. Við eini bíleggingarskipan fer tað at bera til at spjaða ferðsluna javnari yvir dagin. Eisini eru nógvir fyrispurningar stílaðir til mín bæði í 2016 og í ár nær bíleggingarskipanin fer at koma á Kalsoyarleiðina. Hetta er helst fyrispurningar frá ferðavinnuaktørum og ferðafólki.*
- *Mælt verður til, at mannagongdir viðv. eykasigling á Kalsoyarleiðini verða endurskoðaðar. Sum nú er, er tað skipari, ið tekur avgerð um eykasigling. Sostatt er tað eisini skipari, ið skal taka avger, at eykatúrar ikki verða sigldir. Meginreglan er altíð tann, at siglt verður smbr. galdandi ferðaætlan.*
- *Mælt verður til, at eykaskipið (ið vónandi kemur skjótt) kann setast inn á Kalsoyarleiðina . Hetta fyri at avlasta Sam ella at arbeitt verður fram ímóti, at okkurt av umtalaðu ferðaætlanaruppskotum kann realiserast soleiðis, at eykakapacitetur kann setast inn á sumri.*
- *Mælt verður til, at ætlanin at økja túratalið verður mett saman við Klaksvíkar kommunu. Ynskiligt er, at fáa útvega kunning um ferðamynstur hjá ferðafólki.*

Ferðaætlanin er ikki broytt nevnivert hesi 6 árini, men tørvurin at fáa nevndu túrarnar inn í ferðaætlanina er ikki minkaður, heldur vaksin.

Viðmerkjast kann, at síðani notatið varð gjørt, er Erla Kongsdóttir komin sum eykaskip.

Í Samferðsluætlanini fyri 2018-2024 hevur Strandferðslan fylgjandi viðmerkingar:

> *Ferðavinnan hevur týdning í hesum sambandi, serliga um summarið.*
> *Tað skal forðast fyri, at íbúgvar í smærru oyggjunum og bygdunum ikki sleppa við ferjunum, tí onnur ferðafólk skulu við. Her skulu íbúgvarnir hava framíhjárætt. Tað kemur eisini fyri, at ferðafólk eru forðingar á vegunum, tí verandi veganet kann ikki bera so nógva bilferðslu samstundis.*

---

[3] Kalsoyarleiðin, ynski sent SMR 04.2016 og viðgjørt 2016/2017- Arbeiðsbólkurin fyri Kalsoyarleiina 2017, s. 11
[4] Kalsoyarleiðin, ynski sent SMR 04.2016 og viðgjørt 2016/2017- Arbeiðsbólkurin fyri Kalsoyarleiina 2017, s.17

*Fyribils ferjuætlan er gjørd fyri norðuroyggjarnar, men samlaða ferjuætlanin er ikki gjørd, har Sandoyartunnilin er tikin við. Hetta er í gerð í løtuni. Strandferðslan hevur framtíðarhugsanir um, at um núverandi ferjuflotin, ið røkir útoyggjarleiðirnar, verður skiftur út, so kann Sam, ið siglir millum Klaksvík og Syðradals, sigla sum farmaskip, taka sær av rusksigling, sigla við olju til útoyggjarnar og røkja aðrar fyrifallandi uppgávur.*

*Strandferðslan vísir á, at við at skifta ferjuflotan út við tríkiljur, kann manning sparast, útlátið minka munandi, minkast um larm og ferðatíðirnar styttast munandi.*

*Tað skal góð planlegging til at betra um samferðsluviðurskiftini, og tað tykist ikki at vera ætlanin at koyra meira orku á samferðslukervið. Tí mugu loysnir finnast fyri, hvussu tað kann rekast meira skynsamt. Strandferðslan mælir til, at viðkomandi partar seta seg saman og gera eina felags ætlan fyri, hvussu viðurskiftini við oyggjarleiðunum best kann skipast.*

*Ferðavinnan er ein vaksandi vinna, ið alsamt størri fyrilit má takast fyri. Stóri vøksturin hevur seinnu árini lagt eitt støðugt vaksandi trýst á Strandferðsluna, ið vanliga hevur lagt ferðaætlanina eftir tørvinum hjá oyggjabúgvunum. Strandferðslan hevur eina siðvenju at leggja ferðaætlanir við høvuðsdenti á tørvin hjá teimum. Tað vil siga, at ein oyggjabúgvi, um hann býr á Kalsoynni ella Suðuroynni, skal kunna sleppa til Havnar ella Klaksvíkar og koma aftur sama dag. Men eftir at ferðafólk hava fingið eyguni upp fyri Føroyum sum ferðamannalandi, er hendan siðvenjan undir trýsti. Ferðafólk hava ein annan tørv enn tann, ið útoyggjabúgvar hava. Hetta leggur trýst á Strandferðsluna, tí skipini eru ikki til henda økta tørvin.*

## Samrøður í sambandi við kanningin

Kanningararbeiðið byrjaði við einum borgarafundi í Mikladali 17 februar 2022, har fleiri kalsoyingar vóru til staðar. Síðani eru millum annað gjørdar fylgjandi samrøður:

- Samrøður við borgarar í Kalsoy
- Samrøður við ferðavinnuaktørarar í Kalsoy
- Samrøður við tey, sum vara av bussunum hjá bygdaleiðum í Kalsoy
- Samrøður við manning og onnur umboðandi SAM
- Samrøður við umboð fyri aktørarar innan ferðavinnuna
- Samskifti við myndugleikar SSL, Klaksvíkar kommunu og Landsverk

Áleið 35 samrøður eru gjørdar í alt.

Endamálið við kanningunum/samrøðunum var at fáa eina lýsing av avbjóðingunum, ið standast av vaksandi ferðafólkaferðsluni og møgulig hugskot til, hvat kann verða við til at betra umstøðurnar.

Út frá kanningartilfarinum kann tørvurin í stuttum bólkast í fylgjandi:

**Kalsoyingar:**
**Tørvur er á:**

- Regluligari sigling, soleiðis at til ber at fara til arbeiðis, handils, lækna ella onnur ørindi allar dagar í vikuni.
- At bátur siglir kl. 10.00 hvønn dag, og at tað eru fleiri túrar leygardag og sunnudag.
- At siglt verður av Klaksvík kl. 14.00 og 15.30 ístaðin fyri 14.50 og 16.10.
- At sama ferðaætlan er galdandi bæði summar og vetur.
- At bussurin koyrir regluliga, og at pláss er fyri teimum ferðandi í bussinum.
- Góðari kunning, í góðari tíð, tá broytingar eru á ferju- og busssambandi.
- Eini bíleggingarskipan

**Ferðavinnan:**
**Tørvur er á :**

- At bátur siglir kl. 10.00 hvønn dag, soleiðis at tað verður betri flow av ferðafólkum gjøgnum vikuna, umframt leygardag og sunnudag kl. 18.30
- Nøktandi busskapaciteti, sum kann flyta ferðafólkini runt oynna, eisini ímillum Trøllanes og Mikladal
- Góðari og nøktandi kunning, sum røkkur til ferðafólkini, tá broytingar eru á ferju- og busssambandinum. Heimasíða og SMS skipan hevur ikki víst seg at verða nøktandi.
- Bíleggingarskipan, har til ber at planleggja allan túrin til og úr Kalsoy

Tørvurin hjá teimum, sum búgva í Kalsoy, og teimum, sum fáast við ferðavinnu, er í stuttum tann sami, sjálvt um tørvurin verður lýstur á ymiskan hátt.

Tey ferðafólkini, sum fara eindagstúr til Kalsoyar, hava ikki brúk fyri at hava bil við, um bussurin koyrir bæði í samband við Sam og ímillum túrarnar hjá Sam, soleiðis at til ber at vitja allar bygdirnar.

## Møguleikan at fara við bussi til Kalsoyar sum ferðafólk

Fleiri av samrøðunum við ferðavinnuaktørar vísa á, at ferðafólk sjáldan eru áhugað í at ferðast til Kalsoya í egnum bili men gera tað, tí tað er neyðugt. Víst verður á, at verandi bussambandi ikki er nøktandi, um man ynskir at vitja fleiri bygdir í Kalsoy.

Eisini vísa ferðavinnuaktørar á, at tá ferðafólk ferðast samlað í bussi, er einklari at skipa túrar í oynni, tí ofta hava fólk bílagt túrar á Kalsoy við ferðaleiðara, men so er bilurin ikki sloppin við Sam kl. 10.00, og ferðafólkini møta tí ikki upp til ásettu tíð.

Royndir vísa, at ferðafólkini eru bert 2 í hvørjum bili í miðal. Hetta merkir, at um Sam er fullsettur av bilum við ferðafólkum, er talan um í miðal 24 ferðafólk. Roknast má við, at ikki bert ferðafólkabilar eru við bátinum, men at kalsoyingar eisini eru við.


Gunn Ráðgeving, Vestara Bryggja 15, 100 Tórshavn, telefon 259700, gunn@gunn.fo, www.gunn.fo

Ferðavinnuaktørar og onnur vísa á, at tey flestu ferðafólkini, sum vitja Kalsoy, fara av Klaksvík við Sam kl. 10.00. Túrurin kl. 8.00 vísur seg at verða ov tíðliga hjá teimum flestu ferðafólkunum. Møguleiki er eisini fyri einum túri seinnapart, men tá er avbjóðingin, at fyrsti túrur hjá Sam seinnapartin verður ikki fari av Klaksvík fyrrenn kl. 14.50, og seinasti túrur av Syðradali, sum ikki er við tilkallan, er kl. 18.25. Hetta merkir, at túrurin í Kalsoy bert kann verða 3 tímar 15 min. Alternativt um farið verður heim við seinasta túri, kl. 22.35, sum er ein túrur sum skal tilkallast, verður túrurin í Kalsoy 3 tímar 45 min. longri, tvs 7 tímar íalt. Túrurin fyrrapart er 4 tímar 50 min.

Mánadag, mikudag og fríggjadag ber til at fara við bussi úr Tórshavn til Klaksvíkar um morgunin kl. 7.55. og við Sam av Klaksvík kl. 10.00, sum víst á myndini niðanfyri og tá ið komið er aftur úr Kalsoy, ber til at sleppa  aftur til Tórshavnar við bygdaleiðum.

Á seinnapartstúrinum ber til at fara  við bussi úr Tórshavn kl. 12.10 og við Sam av Klaksvík kl. 14.50, sí myndina niðanfyri. Seinasti bussur á leið 400 Klaksvík -Tórshavn er kl. 19.35.

| | Túrur fyrrapart | Túrur seinnapart |
|---|---|---|
| 400 Tórshavn – Klaksvík  (Buss) | kl.7.55 - 9.25 | kl.12.10 - 13.40 |
| 56   Klaksvík - Syðradal (Sam) | kl.10.00 - 10.20 | kl.14.50 – 15.10 |
| 506 Syðradal – Trøllanes (Buss) | kl.10.30 - 10.50 | kl.15.10 – 15.40 |
| Túrurin út á Kallin | kl.11.00 - 13.00 | kl.15.50 - 17.50 |
| 506 Trøllanes – Mikladal (Buss) | kl.12.30 - 12.40<br>kl.14.35 - 14.45 | kl.18.15 - 18.25 |
| 506 Mikladal – Syðradal (Buss) | kl.14.45 -15.00<br>kl.16.05 - 16.20 | kl.18.25 - 18.40 |
| 56   Syðradal - Klaksvík (Sam) | kl.15.10 - 15.30<br>kl.16.30 - 16.50 | kl.18.50 - 19.10 |
| 400 Klaksvík – Tórshavn (Buss) | kl.15.10 - 16.40<br>kl 16.30 - 18.00<br>kl 18.10 - 19.40 | kl.19.35 - 21.05 |

Tó eru hesar avbjóðingarnar:

- Túrurin kl. 12.30 við leið 506 úr Trøllanesi til Mikladals er ov tíðliga, um fleiri skulu náa við. Tey flestu brúka 2 tímar at ganga út á Kallin og aftur til Trøllanesar. Royndirnar frá seinasta árið vístu, at tey flestu komu aftur til Tøllanesar, *aftaná* at bussurin var farin avstað til Mikladals.  Túrurin við leið 506 kl. 14.35 er ov seinur. Ein túrur átti at verið ímillum kl.12.30 og kl.14.35, áleið kl. 13.00 ella 13.15.
- Á seinnapart túrinum er neyðugt at bíða í 1 tíma 10 min. í Klaksvík, áðrenn Sam fer av Klaksvíkini kl. 14.50.
- Á seinnapartstúrinum ber ikki til at ganga út á Kallin og vitja Kópakonuna, um ynski er at fara heimaftur við Sam kl. 18.50. Sam siglir ein tilkalli túr seinni og tað er kl. 22.35 av Klaksvík
- Sam fer av Syðradali til Klaksvíkar samstundis, sum bussurin leið 400 fer úr Klaksvíkar til Tórshavn kl. 15.10 og 16.30. Hetta merkir, at neyðugt er at bíða minst 1 tíma og 10 min. í Klaksvík til næsta túr við leið 400 Klaksvík -Tórshavn
- Leið 400 Tórshavn Klaksvík/Klaksvík – Tórshavn koyrir ikki leygardag og sunnudag fylgjandi túrar:
    - Kl. 7.55 úr Tórshavn verður ikki koyrdur leygardag og sunnudag

- Kl.12.10 úr Tórshavn verður ikki koyrdur  sunnudag
- Kl.15.10 úr Klaksvík verður ikki koyrdur leygardag
- Kl.16.30 úr Klaksvík verður ikki koyrdur leygardag og sunnudag
- Kl.19.35 úr Klaksvík verður ikki koyrdur leygardag

Hetta merkir at í vikuskiftinum ber ikki til at fara úr Tórshavn við leið 400 Tórshavn / Klaksvík og sleppa víðari til Kalsoyar við leið 56, Sam.
So í løtuni er tað bert mánadag, mikudag og fríggjadag, at til ber at koyra úr Tórshavn til Trøllanes og aftur við SSL.

## Tilmæli og uppskot til broytingar

### Ferja- og busssamband

Skotið upp verður, at mælt verður SSL til at gera fylgjandi broytingar í ferðaætlanini:

1. Leið 56   Klaksvík-Syðradal siglir  kl. 10.00 av Klaksvík **7** dagar um vikuna
2. Leið 56   Klaksvík-Syðradal  siglir av Klaksvík klokkan 14.00 og 15.30, ístaðin fyri klokkan 14.50 og 16.10 um summarið.
3. Leið 56 Klaksvík-Syðradal siglur av Klaksvík leygardag og sunnudag kl. 18.30
4. Leið 506 Mikladal- Syðradal koyrir millum Trøllanes og Mikladal kl. 13.00 ella kl. 13.15
5. Leið 506 Mikladal-Syðradal koyrir av Trøllanesi til Syðradals og aftur kl. 13.45 og kl. 15.00
6. Leið 400 Tórshavn-Klaksvík/Klaksvík-Tórshavn, leygardag og sunnudag fylgjandi túrar verða koyrdir:
    a. Kl. 7.55 úr Tórshavn leygardag og sunnudag
    b. Kl.12.10 úr Tórshavn sunnudag
    c. Kl. 15.10 úr Klaksvík  leygardag
    d. Kl.16.30 úr Klaksvík leygardag og sunnudag
    e. Kl. 19.35 úr Klaksvík  leygardag

Umframt at veita kalsoyingum eina betri tænastu, sum teir hava ynskt í fleiri ár, fer ferðavinnan eisini at merkja hesar broytingar í tíðarætlanini.

Við broyttari ferðaætlan

| | Túrur fyrrapart | Túrur seinnapart |
|---|---|---|
| 400 Tórshavn - Klaksvík  (Buss) | kl. 7.55 - 9.25 | kl. 12.10 - 13.40 |
| 56   Klaksvík - Syðradal (Sam) | kl. 10.00 - 10.20 | kl. 14.00 - 14.20 |
| 506 Syðradal – Trøllanes (Buss) | kl. 10.30 - 10.50 | kl. 14.30 - 14.50 |
| Túrurin út á Kallin | kl. 11.00 - 13.00 | kl. 15.00 - 17.00 |
| 506 Trøllanes – Mikladal (Buss) | kl. 13.00 - 13.10<br>kl. 13.45 - 13.55 | kl. 17.00 - 17.10 |
| 506 Mikladal – Syðradal (Buss) | kl. 13.55 - 14.10<br>kl. 15.20 - 15.40 | kl. 18.25 - 18.40 |
| 56   Syðradal - Klaksvík (Sam) | kl. 14.20 - 14.40/15.50 - 16.10 | kl. 18.50 - 19.10 |
| 400 Klaksvík – Tórshavn (Buss) | kl. 15.10 - 16.40/16.30 - 18.00 | kl. 19.35 - 21.05 |


Gunn Ráðgeving, Vestara Bryggja 15, 100 Tórshavn, telefon 259700, gunn@gunn.fo, www.gunn.fo

Hesar broytingar í ferðaætlanin merkja at:

- Til ber at gera ein túr út í Kalsoy, fyrrapart og ein seinnapart, har samband er við bussin ímillum Tórshavn og Klaksvík 7 dagar um vikuna
- á bæði túrinum fyrrapart og seinnapart er møguligt at vitja Kallin og Kópakonuna við bussi.
- tíðarrúmi ímillum túrarnar á leið 56 Klaksvík - Syðradal verður styttri allar dagar.
- smidligari hjá teimum, sum brúka bygdaleiðir, við tað at tey sleppa undan at bíða yvir ein tíma í Klaksvík, áðrenn leið 400 Klaksvík – Tórshavn, fer úr Klaksvík. Hetta hevði stytt bíðitíðina til millum 20-30 minuttir.

Umframt ein túr fyrrapart og seinnapart ber eisini til at fara ein kvøldartúr til Kalsoy.

### *Samband við aðrar bygdaleiðir*

Við verandi bussferðaætlan er tað bara leið 410 Fuglafjørður - Gøtudalur - Klaksvík, sum møtist við leið 400 Tórshavn - Klaksvík í Gøtudali, og har til ber at skifta buss og soleiðis koma frá Fuglafirði og víðari við leið 400 Tórshavn - Klaksvík kl. 7.25 og 13.25.

Leið 300 Sørvágur - Tórshavn og leið 100 Vestmanna - Tórshavn steðga báðar við tunnilsmunnan í Kollafirði 10 min., eftir at leið 400 Klaksvík - Tórshavn, hevur steðgað har ávegis til Klaksvíkar.

Tað hevði verið ein fyrimunur fyri ferðavinnuna, um hugt var eftir bussleiðunum, eisini við ferðavinnubrillum, soleiðis at bussarnir spældu betri saman, eisini tá ið talan er um ferðavinnuna.

### Prísur

Í samband við ferðavinnuflutning eigur at verða hugt nærri at møguleikanum fyri, at tey, sum búgva í Kalsoy og møguliga tey, sum hava hús ella arbeiða á Kalsoy, hava eitt ’oyggjakort’, soleiðis at tey fáa ein lægri ferðaseðlakostnað enn onnur ferðfólk, sum ikki vanligt ferðast til Kalsoy. Bæði í Danmark, Stóra Bretlandi og aðrastaðni eru tílíkar skipanir, har borgarar hava sonevnd borgarakort.

Kostnaðurin fyri ein túr við bussi og báti til Kalsoyar er í dag fylgjandi:

| | | |
|---|---|---|
| 400 Tórshavn -Klaksvík/aftur | 2x90 kr. | kr.180 |
| 56 Klaksvík- Syðradal/aftur | | kr. 40 |
| 506 Syðradal – Trøllanes | 2x20 kr. | kr. 40 |
| Íalt | | kr. 260 |

Í Føroyum kunnu ferðafólk keypa eitt sokallað ‘Travelcard’ fyri fylgjandi prísir:

4 dagar: 500 kr
7 dagar: 700 kr

Í Danmark hava tey, sum til dømis búgva á Ærø, ella tey, sum hava hús har, eitt ’Økort’, sum tey brúka á ferjuni millum Fyn og Ærø.


Gunn Ráðgeving, Vestara Bryggja 15, 100 Tórshavn, telefon 259700, gunn@gunn.fo, www.gunn.fo

Munur er á ferðafólkaprísinum um summari og vetrinum. Um veturin gjalda øll sama prís, men um summarið er gjaldið á ferjuni millum Ærø og Fyn 53% hægri hjá ferðafólkunum, sum ikki hava "Økort".

Niðanfyri er eitt dømi uppá prísir fyri eindagstúr Tórshavn – Kalsoy og aftur, íroknað buss á Kalsoy, har ferðafólki skal gjalda 50% meira enn tey, sum búgva / ferðast nógv til Kalsoy, og sum hava Oyggjakort:

| | Fólk við 'Oyggjakortið' | Onnur ferðafólk |
|---|---|---|
| Tórshavn -Kalsoy/aftur | Kr. 260 | kr. 390 |
| Klaksvík -Kalsoy/aftur | kr. 80 | kr. 120 |

SSL eigur at umhugsa at innføra ymiskar prísir fyri tey, sum búgva í / ferðast nógv til Kalsoy og ferðafólk, sum til dømis fara ein dagstúr til Kalsoy. Hetta hevði verið lættast gjørt við eini bíleggingarskipan, men inntil bíleggingarskpanin er komin, eigur at bera til at bjóða ferðafólkunum túrar, so sum Tórshavn – Kalsoy og aftur fyri 400 kr, og Klaksvík – Kalsoy og aftur fyri 120 kr, har bussurin í Kalsoy er íroknaður, ístaðin fyri at kunna ferðast við 'Travelcard' í 7 dagar fyri kr. 700.

Ein tílíkur prísur kundi eisini verið við til at fíggja fleiri túrar, soleiðis at ferðasambandið bleiv meiri nøktandi, og at oyggjabúgvar eisini høvdu merkt ágóðan av ferðavinnuni sum nakað jaligt, heldur enn neiligt.

Inntil bíleggingarskipanin hjá SSL verður set í verk, verður mælt til eina loysn, har fólk, sum búgva í /ferðast nógv til Kalsoy, gjalda ein prís, og ferðafólk ein annan prís.

## Nøktandi kapasitetur á bussinum

Neyðugt er við einum størri bussi at røkja bussfarleiðina á leið 506 Syðradalur - Trøllanes um summari. Í hagtølunum er torført at síggja, hvussu nógv ferðandi eru á hvørjum túri við Sam, og hvussu nógv ikki sluppu við bátinum. Men í samlaðu hagtølunum sæst, at í tíðarskeiðinum 1 juni - 1 september ferðast nógv ferðafólk í Kalsoy, og tað er ov ofta, at øll ikki sleppa við bussinum og mugu fara aftur til Klaksvíkar. Summi velja eisini at tumla, tá ið tey ikki sleppa við bussinum.

Í juli 2021 avgjørdi SSL at seta ein stóran buss, sum tók 48 fólk, í Kalsoy. Hetta var eitt gott tiltak. Fleiri hava gjørt vart við, at sjálvt við tí stóra bussinum vóru onkuntíð avbjóðingar við, at ikki øll sluppu við bussinum.

Mælt verður til, at størri busskapasittur verður tøkur á leið 506 Syðradalur - Trøllanes, í tíðarskeiðinum 1. juni til 1. september, og at talið av teimum, sum brúka bussin, og teimum, sum ikki sleppa við bussinum, verður skrásett.



Gunn Ráðgeving, Vestara Bryggja 15, 100 Tórshavn, telefon 259700, gunn@gunn.fo, www.gunn.fo

## Bíleggingarskipan – Møguleika at planleggja ferðina út á Kallin heimanífrá

Ein bíleggingarskipan er neyðug á Kalsoyarleiðini og hevði bøtt munandi um óvissuna um, um pláss er umborð á SAM og í bussinum á Kalsoy. Hetta er galdandi bæði fyri tann ferðandi og ikki minst fyri SSL.

Ein týðandi partur av at ferðast er, at tilrættisleggja ferðina heimanífrá. Tá verður hugsað um ferðing, støð at eta og annað.

At kunna planleggja túrin út á Kallin í góðari tíð eigur at bera til, soleiðis at man ikki koyrir til Klaksvíkar fyri at finna út av, at bilurin ikki sleppur við, ella at báturin er fullur av ferðafólkum, og tí var neyðugt at finna eina aðra ferð ella fara heimaftur.

Tað er avgerandi neyðugt at kunna bíleggja bussin, soleiðis at man ikki kemur at standa á ferjuleguni í Syðradali og ikki sleppur víðari.

Tað er eyðsæð, at tørvur er á, at ein bíleggingarskipan verður sett í verk sum skjótast, soleiðis at til ber at bíleggja túrin við SSL sum minimum frá Klaksvík til Trøllanesar og aftur. Tað besta hevði verið, um túrurin kundi bíleggjast frá har, sum bústaðurin er, til Trøllanesar og aftur.

Við eini bíleggingarskipan á Kalsoyarleiðini sleppa ferðafólkabussar og onnur eisini undan at standa 1½ tíma í bíðirøð fyri at tryggja sær pláss. Fyri tey sum gera ferðafólkatúrar í egnum bussum, kann tað verða eitt stórt fíggjarligt tap, um tað ikki eydnast at sleppa við Sam sum ætlað.

Hetta er ein skipan, sum bæði kalsoyingar og ferðavinnan leingi hava eftirlýst, og sum eisini kann vera við til at menna ferðavinnuna um alt landið. Harafturat hevði tað verið við til at betra um liviumstøðurnar í Kalsoy. Eisini kann ein bíleggingarskipan verða við til at økja um inntøkumøguleikarnar hjá Strandferðsluni.

Staðfestast má, at neyðugt er at fáa eina bíleggingarskipan, sum er galdandi bæði fyri bátin og bussin.

Í heildarætlanini um framtíðar ferðavinnumenning ‘Ferðafólk í Føroyum - EIN ÁBYRGDAFULL OG BURÐARDYGG LEIÐ, mai 2017, er bíleggingarskipanin eisini nevnd sum neyðug í sambandi við menning av ferðavinnuni:

> *Strandferðslan eigur sum skjótast at seta í verk eina bókingarskipan á netinum. Ein fortreyt fyri ferðing er, at til ber at leggja til rættis alla ferðina áðrenn. Men hetta ber ikki til, skalt tú t.d. úr París til Suðuroyar. Hetta er ein skipan, sum ferðavinnan leingi hevur eftirlýst. Hon kann menna ferðavinnuna um alt landið og økja um inntøkumøguleikarnar hjá Strandferðsluni. Samstundis eigur Strandferðslan saman við avvarðandi pørtum at eftirmeta ferðaætlanirnar, og leggja tær til rættis við størri atliti at ferðavinnuni.*
> *Fyrsta upplivingin í einum landi hevur nógv at siga fyri restina av ferðini. Tað elvir ofta til ørkymlan, at bussar bara koyra av flogvøllinum í sambandi við úrvaldar flogferðir. Hetta eigur at verða broytt sum skjótast. Ferðavinnan hevur tørv á*


Gunn Ráðgeving, Vestara Bryggja 15, 100 Tórshavn, telefon 259700, gunn@gunn.fo, www.gunn.fo

*reglusemi. Tilkallingarskipanir eru ein bági fyri ferðavinnuna. Reglusemi alt árið og fleiri túrar til úrvald ferðavinnupláss eiga at verða umhugsað. Ein bókingarskipan hevði skúgvað nógv ivamál um innanlands ferðing til viks.*[5]

## Kunning

Tá ið ferjusambandið er óregluligt og knapt, er týdningarmikið við týðiligari og lætt atkomuligari kunning bæði til føroyingar og til ferðafólk. Neyðugt er, at kunningin er bæði føroysk og útlendsk.

Í dag er kunningin um avlýsingar og broytingar hjá SSL lýstar á heimasíðuni hjá SSL, KVF ella umvegis SMS.

Í samrøðunum hava fleiri víst á, at kunningin frá SSL ikki røkkur nóg væl út til tey, sum hava brúk fyri at verða kunnað. Dømi hava við frammi um at :

- Tyskir kampingbilar, sum skulu við Nørrønu morgunin eftir, standa í bíðirøð á ferjuleguni í Syðradali, tá ið Erla Kongsdóttir, sum ikki tekur akfør, røkjur farleiðina fyri Sam.
- Eitt SMS kemur um náttina við upplýsingum um, at í morgin siglir Tjørnunes, sum tekur 12 fólk. Ferðaleiðari vantar eitt ferðalið við 25 fólkum við bátinum kl. 8.00. Neyðugt er at avlýsa á miðjari nátt.
- Bussurin fór til sýn, tá ið sjónleikur var í Mikladali. Fólk komu langvegis frá og ætlaðu við bussinum til Mikladals. Tá ið ferðafólkini stóðu á ferjuleguni í Syðradali, var eingin bussur. Eingin kunning var frammanundan um at eingin bussur koyrdi.
- Fleiri bíleggingar vóru til Kampingøkið í Mikladali, tá ið Sam fór í dok, og Erla Kongsdóttir var sett í sigling. Hetta merkti, at eingin kampingbilur ella annar bilur, slapp til Mikladals. Neyðugt var, at Norðoyar kunningarstova skjótast fekk avlýst allar bíleggingarnar.

Ikki sjáldan koma boðini um broytingar so seint, tá alt er planlagt og neyðugt er tí við avlýsingum.

Roknast má við at ein bíleggingarskipan, fer í ein ávísan mun at nøkta kunningina, soleiðis at tey sum hava bílagt ein túr, verða kunna um broytingar og avlýsingar í góðari tíð.

Meðan bíða verður eftir bíleggingarskipanini, er týdningarmikið, at kunnað verður soleiðis, at ferðafólk eisini fáa nøktandi kunning. Kunningin eigur at umfata millum annað, fylgjandi:

- at tað er avmarkað pláss umborð á Sam, báturin tekur bert 12 bilar. Er talan um at bussar og kampingbilar skulu við, sleppa munandi færri bilar við.
- at tað er avmarkað tal av ferðafólkum, sum sleppa við bátinum (115 við Sam og 95 við Erlu kongsdóttir)
- at broytingar kunnu koma fyri við stuttari freist
- at akfør mugu vænta eina bíðitíð á 1- 1½ tíma

Umframt at SSL kunnar um hesi viðurskifti, er tað eisini týdningarmikið at SSL samstarvar við ferðavinnuskrivstovur, kunningarstovur og onnur um kunningina. Soleiðis at kunning kemur út til tey, sum hava brúk fyri henni, í góðari tíð.

[5] https://lms.cdn.fo/media/9579/uvmr_fer%C3%B0avinna2017_web.pdf?s=Ya0L-y_9wh5RHWCxT8_Y52mPB_g

### *Kunningarskermur á havnalagnum í Klaksvík og á Syðradali*

Mælt verður til, at ein kunningarskermur, verður settur á ferjulegurnar í Klaksvík og í Syðradali, har til ber at fáa kunning um ferðing til/frá Kalsoy, bæði við bili og uttan bil, og har møguleiki er at keypa ein samlaðan ferðaseðil við leið 56 Sam og leið 506 Syðradalur – Trøllanes/aftur.

## Onnur tiltøk á Kalsoy, sum kunnu betra um avbjóðingarnar við verandi støðu

Síðani 2014, tá ið ferðafólkatalið av álvara byrjaði at veksa á Kalsoyarleiðini bæði við ferðafólki og bilum, hevur verið arbeitt við at finna haldgóðar loysnir, soleiðis at rúmd bæði er fyri kalsoyingum og ferðafólkum.

Fokus eigur at vera á tiltøk, sum stuðla, at ferðafólk kunnu *koma eindagstúr til Kalsoy uttan bil.*

### Súkkling í Kalsoy

Um ferðafólkini koma uttan bil og skulu koyra við bussi runt oynna, kundi verið gott, um møguleiki eisini hevði verið fyri at leiga súkklur á ferjuleguni á Syðradali.

At ferðast á súkklu í Kalsoy er ein fantastiskur møguleiki. Seinastu árini hava fleiri valt antin at leiga sær eina súkklu ella at fara á egnari súkklu til Kalsoy. Í 2021 útleigaði fyritøkan 'Rent a bike' millum 75-100 súkklur, sum tey koyrdi norð til Klaksvíkar til fólk, sum høvdu leiga og ynsktu at vitja Kalsoy á súkklu.

Ein avbjóðing at súkklu í Kalsoy er, at tunlarnir eru myrkir og smalir, og vegbreytin er einans 3m breið. Eins og í Noreg er tó loyvt at súkkla í hesum tunlum.

Tunlarnir í Kalsoy hava eitt tunnilsprofil T5, sum svarar til ein einbreytaður tunnil, har ársmiðalferðslan skal verða minni enn 300.

Í veganormarlinum stendur um krøvini til ein tílíkan tunnil, tá ið talan er um súkklandi og gangandi, og tunnilin ikki er longri enn 4000m:

> *Tunneler med tverrprofil T5,5 har relativt liten trafikk og lavt fartsnivå. Det kan derfor tillates med gående og syklende i disse tunnelene*[6]

Í tunlunum í Kalsoy er hámarksferðin 80 km/t, og ferðslan er sera lág. Flestu bilarnir koyra í samband við, at Sam kemur til Syðradal, og bilarnir koyra til og frá Sam. Hetta merkir, at man sum súkklandi møtir lítlari ella ongari ferðslu, uttan tá ið bilarnir koyra til og frá ferjuleguni á Syðradali.

---

[6] https://vegvesen.brage.unit.no/vegvesen-xmlui/bitstream/handle/11250/2654939/Rapport%20129%20Gang-%20og%20sykkeltrafikk%20i%20tunnel%20forslag%20til%20krav%20for%20ulike%20l%c3%b8sninger.pdf?sequence=1&isAllowed=y

Fólk, sum hava súkkla í Kalsoy, greiða frá, at størsta avbjóðingin hevur verið í tí fyrsta tunlinum, Villingardalstunnilinum, har ein brekka er á tí fyrsta strekkinum, og asfaltið er í vánaligum standi. Viðmerkjast skal tó, at Landsverk hevur asfalterað hetta strekki í apríl 2022, so nú skuldi asfaltið verið í ordan. Eisini er avbjóðingin í Villingardalstunlinum, at man ikki sær ígjøgnum tunnilin, bæði tí ein brekka er, og tí at eitt sving er í tí norðara endanum av tunlinum.

### *Tiltøk, sum tilmælast í samband við súkkling í Kalsoy*

1. Møguleiki at leiga súkklur og el-súkklur á ferjuleguni í Syðradali ella á ferjuleguni í Klaksvík.
   Í samband við ætlanini at gera eitt ferðafólkahús á Syðradali (sí niðanfyri), eigur hædd at verða tikin fyri møguleikan at hava el-súkklur at standa innandura og møguleikanum fyri at løða súkklurnar.

2. Fáa tilvega kunningartilfar um súkkling í tunlunum, har kunnað verður um, hvussu tunlarnar eru at súkkla í, soleiðis at tey, sum ætla sær at súkkla í Kalsoy, hava møguleika at kunna seg um umstøðurnar, áðrenn farið verður. Kunnast eigur at verða um[7]:

   - longd av tunli
   - hvar brekkur eru
   - slag av ljósi í tunlunum
   - hvussu ferðast skal í tunlunum - Víkjuskylda – hvør og hvussu skal víkjast, tá ið bilur er í tunlinum.
   - neyðugt er at verða í endursinsvesti
   - gott ljós skal verða á súkklunum, møguliga ljós á høvdinum eisini
   - o.a.

3. Kassar við endurskinum verða settir upp við tunnlismunnanar, soleiðis at møguleiki er at koyra endurskin um beinini og armarnar.

4. Súkkluknap/Súkkluvarnarar







Myndirnar vísa tvey sløg av varnarum, tað fyrsta skal tann súkklandi sjálvur trýsta á tann reyða knappin, soleiðis at lampan fer at lýsa og ávarar um, at súkklur eru í tunlinum. Tann seinna myndin vísur ein varnara, sum skrásetur, um ein súkkla er á veg inn í tunnilin, og tendrar automatiskt.

[7] https://fileserver.motocross.io/trafikksiden/SVV_rapport_257.pdf



Gunn Ráðgeving, Vestara Bryggja 15, 100 Tórshavn, telefon 259700, gunn@gunn.fo, www.gunn.fo

Hesi skelti verða nógv nýtt í Noreg, sum eitt trygdartiltak, tá ið eingin alternativ ruta er uttan um tunnilin.

Mælt verður til at tílík skelti verða sett upp í samband við tunlarnar í Kalsoy.

## Ferðafólkahús

Landsverk hevur í eina tíð arbeitt við einum ferðafólkahúsið á Syðradali.

Ætlaða ferðafólkahúsið, verður 50 kvm. til støddar og skal hava pláss fyri 15 ferðafólkum við viðføri. Húsið verður staðsett soleiðis, at tað er nærhendis, har skipið leggur at, og at ferðafólkini síggja, tá ið skipið kemur. Inngongdin er skipað soleiðis, at bygningurin skal líva fyri vindinum bæði norðan ífrá og sunnan ífrá, so lætt er at koma og fara úr bíðirúminum.

Í november 2020 setti Landsverk ein rottanga niður í økið, har ferðafólkahúsið er ætlað at standa. Klaksvíkar kommuna hevur sett ein WC-vogn har, soleiðis at tey, sum bíða hava møguleikan at sleppa á WC. Eisini eru sett 2 ruskíløt har.




Ætlanin er, at Landsverk byggir ferðafólkahúsð, og Klaksvíkar kommuna hevur raksturin av húsinum um hendi.

Landsverk upplýsir at eingin peningur er avsettur til Ferðafólkahúsið í 2022. Vónandi verður peningur avsettur til 2023.

Visit Faroe Island hevur áður játtað at fíggja 500.000 kr. av kostnaðinum at byggja ferðafólkahúsið, treytað av at verkætlanin eisini innibar hentleikar til ferðafólkakunning og sølu av vørum, soleiðis at ferðafólkahúsi ikki bara er eitt bíðirúm men eisini eitt savningarstað til ferðafólkakunning, og har til ber at keypa sær kaffi og okkurt til matna.






Mælt verður til fylgjandi:

- bygging av ferðafólkahúsið setast í verk sum skjótast, so húsið kann standa klárt summarið 2023
- at ein kunningarskermur verður staðsettur inni í  ferðafólkahúsinum, har tilber at kunna seg um túrar og annað í Kalsoy
- at  møguleiki eisini er hjá ferðafólkum at sita uttandura á eini terassu og bíða eftir ferjuni/bussinum
- at hædd verður tikin fyri møguleikanum at hava el-leigusúkklur at standa undir taki og møguleikanum fyri at løða tær.
- at hædd verður tikin fyri møguleikanum at hava streym til bussarnar á ferjuleguni í Syðradali

## Tiltøk í sambandi við, at ferðafólk hava bil við í Kalsoy.

Hóast at fyribils ikki kann roknast við viðkað ferjusigling til Kalsoy, verður tað mett, at ferðafólk framhaldandi fara at gista í  Kalsoy og hava tørv fyri at hava bilin við í oynna, og at leggjast má upp fyri hesum við ymiskum tiltøkum serliga um summarið.

Eisini er einasta kampingøkið í Norðoyggjum í Mikladali. Tryggjast má, at til ber hjá kampingbilum at sleppa við ferjuni til Syðradals.

## Kunning um, hvussu koyrast skal á 1 breytaðum vegum og tunlum

Kanningin vísir at fleiri útlendsk ferðafólkólk hava avbjóðingar við at koyra á okkara einsbreytðum vegum og tunlum. Soleiðis er eisini á Kalsoy. Fleiri hava gjørt vart við at trupulleikar eru ofta við fylgjandi:

- At ferðafólk ikki koyra inn á víkipláss, bæði á vegnum og inni í tunlunum. Bilarnir steðga oftani mitt á vegnum, soleiðis at tey lokalu mugu bakka longri strekkir.

- Bilar koyra út av vegnum. Fleiri av teimum einbreytaðu vegunum hava ikki vegøksl, og tann hvíta strikan er á ofta tætt við asfaltkantin. Tá ið bilarnir royna at víkja, eru nakrir, sum koma ov langt út og enda ofta í veitini fram við vegnum.

Landsverk hevur gjørt ein faldara og film um at koyra á einbreytaðum vegum og tunlum, sum øll útlendsk ferðafólk eiga at hava sæð, áðrenn tey leiga ein bil, ella koyra í land frá Norrønu. Hetta er ikki ein avbjóðing sum einans er í Kalsoy.

Mælt verður til:

- at filmarnir og kunningarblaðið verður endurskoðað og møguliga víst hvørjir strekkir talan er um, har vegirnir og tunlarnir eru einbreytaðir og kunnað um, at hesir strekkir krevja serlig atlit.
- At Norrøna og bilútleigararnir hjálpa at fáa hesa kunning út til tey, sum ætla at koyra bil í Føroyum, tí hetta er ein stór avbjóðing um summari.

Leinkja til filmin:
https://www.bing.com/videos/search?q=driving+in+the+faroes&&view=detail&mid=BD09CF0A61A178227E0BBD09CF0A61A178227E0B&rvsmid=9CBEED2503EC1189D08F9CBEED2503EC1189D08F&FORM=VDQVAP

## Tørvur á fleiri summarhúsum ella B&B

Um ferðafólkini koma uttan bil, má roknast við, at tey kunnu vera í Kalsoy longri tíð enn ein biltur.

Tørvur er á fleiri gistingarmøguleikum, sum B&B ella líknandi. Fleiri ferðafólk hava ynski um, at kunna uppliva náttúruna í einsemi. Fyri tey hevði tað verið eitt gott hugskot at kunnu gista í Kalsoy og njóta friðin, tá ið ein stórur partur av ferðafólkunum annars eru farin av oynni.

Ætlanir eru frammi um at byggja hotell á Húsum og sethús til útleigan, í Mikladali.

## Bilkø fyri oyggjabúgvar

Stóri vøksturin, sum hevur verið á bilferðsluni til Kalsoy tey seinnu árini, og tað, at eingin bíleggingarskipan er tøk á hesi leið, hevur viðført, at um summarið eru long bíðitíð at fáa bilin við Sam til Klaksvíkar. Hetta hevur havt við sær, at umframt ferðafólkini mugu standa í tímavís í bíðirøð, er eisini neyðugt hjá Kalsoyingum, sum vanliga pendla, at standa leingi í bíðirøð.

Tí tók Klaksvíkar kommuna í 2018 stig til, at íbúgvar á Kalsoynni fingu sína egnu bíðirøð á Syðradali og í Klaksvík, soleiðis at tey sleppa undan at standa í bíðirøð, men skulu møta 15 min., áðrenn Sam siglir. Pláss er fyri 6 bilum í Kalsoyarkøini. Hetta er eitt týdningarmikil tiltak, sum eigur at halda fram.

Trøllanes



*Parkeringspláss í Trøllanesi*

Í dag koma flest ferðafólk til Trøllanes í egnum bili. Hetta merkir, at tað er skjótt, at nógvir bilar standa runt bygdina. At bilar eru við til at broyta støðuna á Trøllanesi, er ikki ringt at fáa eyga á, tá ið man vitjar bygdina. Tá ið ferðafólk koma til Trøllanes við bili og ikki finna parkeringsmøguleikar, hevur tað við sær, at bilar standa allastaðni í bygdini. Fyri at bøta um hesa avbjóðing, hevur Klaksvíkar kommuna tikið avgerð um at gera parkeringspláss á Trøllanesi, beint áðrenn komið verður til bygdina, soleiðis at til ber at ganga oman í bygdina. Ætlanin er at gera 24 parkeringspláss. Ætlanin er at gera parkeringsplássið liðugt í 2022.





Gunn Ráðgeving, Vestara Bryggja 15, 100 Tórshavn, telefon 259700, gunn@gunn.fo, www.gunn.fo

Niðri í bygdini er eitt parkeringspláss til 9 bilar, sum er ætlað íbúgvunum, gestum og teimum, sum hava ørindi í bygdini.

Ætlanin er, at ferðafólk, sum ynskja at vitja Kallin og Trøllanesar bygd, skulu parkera á tí nýggja parkeringsplássinum.

Ein annar møguleiki er at royna at brúka ein part av landsvegnum til parkering. Vegabreiddin millum tær hvítu merkingarnar er 4,8m breiður. Um ein breið vegaøksl  verður gjørd fram við vegnum á tí síðuni, har parkerast skal, og ’armerað græs’ ella líknandi undirlag lagt sum ovasta lag, ber til at parallelparkera fram við vegnum, samstundis sum 3,5m breið vegabreyt er at koyra á. Strekkið sum talan er um er víst við einar reyðari striku  á myndini niðanfyri og er 140m langt.










Um neyðugt er við fleiri parkeringsplássum, kundi ein loysn verið at gjørt $30^0$ parkeringspláss fram við vegnum.

Ferðslan á vegastrekkinum oman til Trøllanes er sera lág, og tí verður mett, at um summari er einki til hindurs fyri, at vegastrekkið er einbreytað. Tó er neyðugt, at bilarnir fáa møguleikan at koyra oman til vegamóti at venda.

Einki steðgipláss ella vendipláss er til bussin, sum steðgar niðri í bygdini. Við stórum ferðafólkabussum er tørvur fyri at bussanir kunnu venda og parkerað trygt og tí eigur pláss at verða avsett til hetta.



Gunn Ráðgeving, Vestara Bryggja 15, 100 Tórshavn, telefon 259700, gunn@gunn.fo, www.gunn.fo

Mælt verður til at umtalaða vegastrekkið verður brúkt til paralellparkering. Hetta hevði verið minni inntriv í náttúruna, meðan bíða verður eftir eini heildarloysn fyri økið, sum umfatar bæði bussar og bilar, umframt móttøkuhús og annað.

### *Skelti*

Við at flyta E55 bygdasonuskelti longur suður, sum víst á myndini, verður hámarksferðin á strekkinum oman til Trøllanes, sum er áleið 140m, 50 km/t og ikki 80km/t sum ídag.




Tann veksandi ferðafólkaferðslan til Trøllanes og manglandi parkeringspláss hava við sær, at bilar standa parkeraðir allastaðni á Trøllanesi. Hetta hevur við sær, at fleiri skelti standa í bygdini, sum skulu verða við til at tálma parkering inni ímillum húsini. Tey reyðu C19 skeltini - innkoyring ikki loyvd - eru sett við innkoyringarnar til býlingarnar. Ein betri loysn er at brúka C21 skelti við undirtekstinum ‘Íbúgvakoyring loyvd’. Teksturin skal verða á føroyskum og enskum.





Um parkeringsloysnin fram við vegnum verður vald, er neyðugt at seta C21 skeltini soleiðis, at tey standa við innkoyringar til býlingarnar, og at pláss er fyri møguleikanum hjá bilunum at venda.

### *Gøtan út á Kallin*

Tann veksandi ferðafólkaferðsluni út á Kallin hevur víst at hava avbjóðingar fyri tað gomlu gøtuna, sum nú eru í ringum standi, samstundis sum nýggjar gøtur stinga seg fram.

Ætlanin er at gera eina nýggja gøtu út á Kallin. Bóndin Jóhannes Kallsgarð, upplýsir, at øll loyvir eru fingin til vega at gera gøtuna. Gøtan skal verða 1,5m breið, soleiðis at ein ATV'ari kann koyra eftir gøtuni, um tørvur er á hjálp.



Longu í apríl er gøtan illa slitin



Ein leygarmorgun í apríl kl. 9.00 eru longu fleiri ferðafólk ávegis út á Kallin

Í Noreg verða nógvar gøtur gjørdar av 'Nepalesiske sherpaer', sum í 10 tey seinastu árini eru komin til Noreg at hjálpa við at gera gøtur og trappur úti í náttúruni. Hetta kundi møguliga verið ein loysn eisini her.

Leinkja til VisitNorway:
https://www.visitnorway.no/aktiviteter-og-attraksjoner/naturlige-hoydepunkter/fjell/norske-fjellstier-bygges-av-sherpaer-fra-nepal/?fbclid=IwAR3O2hFwIpxGEhTcI0QWXfVi57mRkOZNPQowfJxuH-SCyGdTzXY6xC7O1Bc



Gunn Ráðgeving, Vestara Bryggja 15, 100 Tórshavn, telefon 259700, gunn@gunn.fo, www.gunn.fo

Mikladalur



*Skelti*

Við avkoyringina til vegin oman til Mikladals stendur eitt vegvísingarskelti, sum vísur til Mikladals, og eitt kunningarskelti, sum vísir til Kópakonuna. Ístaðinfyri at skriva 'Kópakonan' á hetta skelti kundi ikonin staðið saman við ikonunum: Kampingøkið, Kafe og WC. Longri niðri í bygdini kann síðani vegvísast soleiðis, at ferðafólkini finna kópakonuna. Alternativt kann eitt kunningarskelti setast undir verandi kunningarskelti við ikonunum Kampingøkið, Kafe og WC.











*Parkeringsøkið*

Landsverk hevur gjørt parkeringspláss beint uttanfyri bygdina, har ferðafólk kunnu parkera. Íalt er áleið 16-17 parkeringspláss her. Beint við parkeringplássi er eisini ein kunningartalva.



Gunn Ráðgeving, Vestara Bryggja 15, 100 Tórshavn, telefon 259700, gunn@gunn.fo, www.gunn.fo



Inni í sjálvari bygdini eru eisini parkeringspláss til íbúgvar og onnur. Fyri at umgangast, at ferðafólk koyra inni í bygdina, kann setast eitt C21 skelti við undirtekstinum ‘Íbúgvakoyring loyvd’, har teksturin skal vera á føroyskum og enskum. Skeltini verða sett sum á myndini niðanfyri. Eisini verður sett eitt E55 bygdasonuskelti við bygdanavninum Mikladalur upp, soleiðis at hámarksferðin bert er 50 km/t á økinum, har parkerast skal.






Gunn Ráðgeving, Vestara Bryggja 15, 100 Tórshavn, telefon 259700, gunn@gunn.fo, www.gunn.fo